# m ikki hevði megnað trýstið



*– Tað er bara í Havnini, at vit høvdu fingið kapasitetstrupulleikar á vegunum, um øll koyring og sigling var ókeypis. Aðrastaðni hevði veganetið megnað ferðsluna, sum hevði staðist av hesum, sigur Oyvindur Brimnes, stjóri í Landsverki og limur í strategibólkinum um infrakervið*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

trupulleikanum um útlát sum heild.

## Framkomiligheit

Leila Solmunde, sum er formaður í Meginfelag teirra Brekaðu, vísti á visjónirnar um framkomiligheit.

– Eg vildi ynskt, at visjónin um atkomiligheit var meira ítøkilig.

Í hesum sambandi nevndi hon, at neyðugt er við design fyri atkomu, um øll skulu hava somu møguleikar.

Formaðurin í strategibólkinum, Niels Winther, segði, at bólkurin hevði havt eina aðra orðing enn hana, sum nú er feld niður í visjónsorðingina.

– Vit broyttu orðingina til "allir føroyingar", men henda orðing verður meira ítøkilig, sum frá líður, legði hann aftrat.

Olga Biskupstø, sum eisini er limur í strategibólkinum um infrakervið, helt, at atkoman er ógvuliga týdningarmikil.

Hon ásannaði tó, at tað verður torført at veita øllum føroyingum somu tænastu.

– Men endamálið við visjónunum er at menna øll økir í landinum.

Olga helt, at tað kemur at hava búskaparligan týdning fyri samfelagið, at framkomiligheitin verður betur.

– Eg vænti, at vit fara at fáa fleiri skjóttgangandi skip til ferðafólkaflutning.

Hon segði seg annars vera samda við løgmanni um, at tað ongantíð kann vera ov lætt at ferðast.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, vísti á, at ógreiðir spurningar eru á nógvum økjum millum land og kommunur um vegakervið.

Oyvindur Brimnes segði, at Landsverk hevur roynt at sloppið sær av við ávísar vegir, sum hann tók til.

– Tá ið krøv koma um hesar vegir, verður Landsverk biðið um at gjalda, men eg haldi, at tað er tann, sum setir krøvini, sum eigur at bera kostnaðin, segði hann.

## Positivur dynamikkur

Niels Winther segði, at tað fer at skapa ein positivan dynamikk í samfelagnum, um tað verður gjørt lættari og skjótari at ferðast til og úr Føroyum.

Kaj Leo Johannesen segði seg vænta, at vit um eini 10 ár fara at hava flogvøll, sum verður einar 1800-2000 metrar langur – líkamikið, hvar í landinum hesin flogvøllur tá liggur.

Olga Biskupstø vísti á, at tørvirnir eru ymiskir.

– Summi hava tørv á at ferðast millum Føroyar og umheimin – og onnur hava tørv á at ferðast millum Mykines og Vágar, sum hon tók til.

Jóannes Ejdesgaard man eisini við trupulleikan, sum undir verkfalli hevur staðist av, at siglingin um eitt nú Suðuroyarfjørð er vorðin niðurløgd.

– Vandin er, at vinnan ikki torir at etablera seg í økjum, sum kunnu verða rakt undir verkfalli, og tað er ógvuliga óheppið.

Løgmaður segði, at ein partur av visjónunum er at tryggja, at samband altíð er millum miðstaðarøkið og útjaðaran.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, ásannaði, at hetta er ein stórur og eymur spurningur.

Hann legði aftrat, at landsstýrið hevur boðsent felagnum til fundar um hesi viðurskifti.



*– Tá ið Smyril siglir fullur hvønn túr, hevur Suðuroyggin einki "problem" meira, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandfaraskipum Landsins*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*